## Kendur ítróttarsálar- frøðingur til Føroya

Synergi skipar 20-22 maj fyri skeiði og temakvøldið: »Hevur tú neyðugu styrkina tá á stendur?«. Tiltakið verður fyri øll, sum eru áhugað í at læra um ítróttarsálarfrøði, tað veri seg íðkarar, venjarar, leiðarar o.s.fr.

Á skeiðnum fært tú innlit í, hvussu tú sjálvur kanst stýra kenslum sum fjáltri, aggresiónum, sjálvsáliti og dirvi.

Skeiðleiðari verður Jørn Ravnholt frá DIF, sum hevur undirvíst á meiri enn 200 skeiðum í ítróttarsálarfrøði. Hann hevur eisini verið ráðgevi hjá meiri enn 30 donskum landsliðum í flestu ítróttargreinum. M.a. var hann ráðgevi hjá donsku gull hondbóltsgentunum áðrenn tær vunnu EM 2002.

Fyrireikararnir siga, at skeiði gevur eitt gott mentalt amboð, sum hjálpir tær at seta mál, fyri síðan at røkka teimum. Avmarkað luttøka.

**EyS**

## M-kvøld í Hvalba

**Leygarkvøldið verður stórt tiltak í Roynhøllini fyri hvalbingum og sandvíkingum. Og tað er alt ókeypis**

TILTAK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Steinbjørn B. Jacobsen, lærari og rithøvundur, verður gestarøðari á M-kvøldinum í Hvalba leygarkvøldið*

Leygarkvøldið verður stórt tiltak í Roynhøllini í Hvalba.

Tað er eitt tiltak, sum fyrireikararnir kalla eitt M-kvøld.

Tá ið slík kvøld hava verið við einum bókstavi frammanfyri, hevur tað aloftast okkurt við øl ella skonking at gera.

Men tað er tað ikki hesuferð.

M-kvøld stendur nevniliga fyri mentanarkvøld og tað eru ein mentanarbólkur, sum Niels Olaf Eyvindsson og Norðleif við Krógv, manna, ið stendur fyri tiltakinum.

Tiltakið er ætlað hvalbingum og sandvíkingum og tað byrjar klokkan 19 leygarkvøldið.

Teir hava frammanundan skipað fyri ymsum tiltøkum og peningurin, sum er innkomin, verður brúktur til at fíggja hetta tiltakið við.

Sostatt er alt ókeypis. Hvørt sanghefti er samstundis ein lutaseðil har ymsir vinningar eru, og enntá tað er ókeypis.

Og nú talan er um eina fjølbroytta skrá og alt tiltakið er ókeypis, hava teir sett nøsina upp eftir at fáa savnað eini 300 sóknarfólk í Roynhøllini leygarkvøldið.

Á tí tilsvarandi tiltakinum í fjør vóru 200 fólk.

### Ymiskt á skránni

Á tiltakinum verður høvið at síggja eina framsýning um kolagrevsturin í Hvalba. Umframt Rangabotn í Trongisvági, er Hvalba einasta pláss í landinum, har kolagrevstur hevur verið ein veruligur vinnuvegur og framsýningin lýsir ymsar tættir í hesi vinnu.

Annars fer felagskórið hjá brøðrasamkomuni í Suðuroy at syngja.

Ein røða verður eisini. Tað er Steinbjørn B. Jacobsen, sum er úr Sandvík, ið fer at halda røðu.

Tey fara eisini at syngja í felag, her er talan um sangir, sum sandvíkingar og hvalbingar hava yrkt.

Men okkurt skal eisini vera til matna og í tí sambandinum verður stórt kalt borð.

## Frágreiðingin um Norrønu aftur útsett

Frágreiðingin um óhappið á Norrønu hin 15. januar 2004 útsett

Uppskot til frágreiðing hevur verið til partshoyringar. Nakrar viðmerkingar eru komnar inn og eru viðgjørdar.

Ein partur í málinum hevur sambært grein 11 í Fyrisitingarlógini biðið um, at almannakunngerðingin av frágreiðingini verður útsett.

# Skipini hjá strandferðsluni skulu ikki aftur verða løgd av ósemjum



*– At siglingin hjá Strandferðsluni javnan er hótt av verkfalli ella verkbanni er størsta álvarsmál yvirhøvur í Føroyskum politikki í løtuni, heldur løgmaður*

**Nú fer Landsstýrið at leggja alla orku í at forða fyri, at skipini hjá Strandferðsluni aftur verða rakt av verkfalli ella verkbanni**

STRANDFARA-SIGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

– Nú skulu skipini hjá Strandferðsluni ikki einaferð afturat verða løgd av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Tað fer landsstýrið nú at gera alt fyri at forða.

Tað eru ikki meiri enn tríggjar vikur síðani, at ósemja um sáttmálan ímillum maskinmeistararnir og Fíggjarmálaráðið hótti við at leggja skipini hjá Strandferðsluni.

Og nú er longu aftur galið.

Hesuferð er tað ósemja um sáttmálan hjá skiparunum ogf stýrimonnunum við Strandferðsluni øðrumegin og fíggjarmálaráðið hinumegin, sum hóttir við at leggja Srandferðsluna.

– Eitt er, at hetta kemur ómetaliga illa við hjá vanliga ferðamafólkinum, sum siglur við Strandferðsluna.

– Men tað, sum er nógv álvarsligari, er, at vinnulívið rætt og slætt ikki kann liva við hesum umstøðunum, tí trupulleikarnir eru ivaleysa stórir frammanundan, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Vinnulívið er nú komið í ta støðu, at tað torir ikki at keypa fisk, bara tí at hóttan um arbeiðssteðg hongur í luftini, tí vandi er fyri, at virkini koma at liggja innibrend við fiskinum.

– Hetta er eitt sera álvarsligt mál. Hetta er tað álvarsligasta málið yvirhøvur á politiska pallinum í løtuni, sigur Løgmaður.

### Taka málið upp beint nú

Løgmaður sigur, at landsstýrið fer tískil at leggja alla orku í at loysa hendan trupulleikan.

Hon tað skilst á honum, at Landsstýrið metir, at hetta er eitt mál, sum hevur stóran skund.

Hann sigur, at hetta er fyrst og fremst eitt vandamál, sum rakar Suðuroyarsiglingina, tí har er teinum longst at sigla. Men hetta er eisini ein stórur trupulleiki um Skopunarfjørð og um Leirvíksfjørð.

Sjálvur tók Løgmaður málið fram á fundi í Landsstýrinum týsmorgunin.

Har gjørdi Løgmaður av at hann skuldi seta seg at viðgera málið saman við Bárði Nielsen, landsstýrismanni, sum umsitur starvsfólkamál, og Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í samferðslumálum.

– Saman skulu vit royna at finna eina ella aðra skipan so at siglingin hjá Strandfersðluni ikki skal verða rakt av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum í framtíðini.

Løgmaður veit ikki, hvussu ein slík skipan kann gerast.

Men hann ásannar, at hetta er eitt sera trupult mál at loysa at loysa.

– Hetta er eitt mál, sum nógv landsstýri hava havt frammi, hvørja ferð ein ósemja hevur tikið seg upp. Men tá ið vandin er av, er málið gloymt aftur.

– Men nú heldur hann, at arbeiðsósemjurnar eru so títtar, at tað er alneyðugt at taka málið upp beint nú.

### Virða samráðingarrættin

Jóannes Eidesgaard viðgongur eisini, at hetta er eisini eitt trupult mál, tí tað er avgjørt neyðugt at virða rættindini hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at samráðast – og til at fara í verkfall, ella at lýsa verkbann.

– Og eitt verkfall, ella eitt verkbann, virkar bara um tað rakar so meint sum gjørligt. Og har er júst siglingin hjá Strandferðsluni eitt sera hent vápn hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Men hann vísur á, at í hesum føri er støðan tann, at tað eru tey somu økini í samfelagnum, sum verða rakt hvørja einastu ferð: Tað er útjaðarin og tað er fyrst og fremst Suðuroyggin, men eisini Sandoy og Norðoyggjar.

Løgmaður sigur, at ein loysn kann vera at gera manningina, sum er minstakrav fyri at hava skipini siglandi, til tænastufólk.

– Men tað verður neyðugt at finna eina loysn, sum fakfeløgini taka undir við

Tað eru fimm fakfeløg, sum talan er um. Tey eru Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið, Starvsmannafelagið, Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag.

– Hvørja ferð, okkurt av hesum feløgunum er við í eini ósemju, er siglingin hótt. Og eg vóni, at tey skilja støðuna og duga at síggja álvaran í málinum og vilja vera við til at finna eina varandi loysn, sigur løgmaður.





*Nýggi Smyril var ringasti knúturin at loysa, men tað eydnaðist og sostatt slapp undan verkfalli ella verkbanni í á hesum sinni*

# Fáa ikki fulla nyttu burtur úr nýggja Smyrli

**Eftir kravin um frá Skipara- og navigatørfelagnum fer tað at avmarka møguleikarnar at brúka nýggja Smyril, sigur fíggjarmálaráðið**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Verður kravið frá skipara- og navigatørfelagnum fylgt, fara suðuroyingar ikki at fáa fulla nyttu burtur úr nýggja Smyrli.

Tað er orsøkin til, at fíggjarmálaráðið ikki vil góðtaka kravið frá Skipara- og navigatørfelagnum.

Partarnir hava síðani týsdagin samráðst saman við semingsmanninum um nýggjar sáttmálar fyri yvirmenninar á skipunum hjá Strandferðsluni og fiskirannsóknarskipinum, Magnusi Heinasyni.

Semingsmenninir hava givið pørtunum munnkurv og tí hava teir hesar seinastu dagarnar ongar viðmerkingar havt til samráðingarnar.

Men áðrenn samráðingarnar byrjaði, segði lønardeildin á heimasíðu síni, at hon vildi ikki ganga við til treytirnar frá Skipara- og Navigatørfelagnum, tí tað fór at føra við sær, at møguleikarnir at brúka nýgga Smyril fer at vera avmarkaður.

Nýggi Smyril hevur nógvar møguleikar. Men verður kravið frá Skipara- og navigatørfelagnum gingið á møti, fer tað at læsa nýggja Smyril fastan í eini skipan, sum er dýr og stirvin og tað fer at avmarka møguleikarnar at brúka skipið, sigur lønardeildin.

### Alt ov dýrt at økja túratalið

Eftir teirri skipan, sum nú er galdandi, eru yvirmenninir hjá Strandferðsluni umborð eftir einari 1:1 skipan. Tað merkir, at teir umborð í eina viku og í landi í eina viku.

Hendan skipanin er ikki staðfest í sáttmálanum. og tað er júst kravið frá Skipara- og navigatørfelagnum.

– Fær felagið sítt krav ígjøgnum, má siglingin við nýggja Smyrli verða áleið tann sama, sum hon er í dag, sigur lønardeildin

Tað merkir, at tað fer ikki at bera til at skerja, ella at økja túratalið, uttan at tak fer at kosta órímiliga nógv, sigur lønardeildin.

Hon sigur, at skipanin, sum nú er galdandi, er 30 ára gomul og hon er bæði stirvin og ótíðarhóskandi

– Ein høvuðstrupulleiki við sáttmálanum er, at øll tíðin, skipið er í sigling, telur sum arbeiðstíð. Tí er arbeiðstíðin vanliga løgd eftir ferðaætlanini, sum siglt verður eftir.

– Eftir sáttmálanum skal tímatalið í vaktarskipanini vera akkurát 42, 56, 63 ella 84 tímar um vikuna.

Men eftir ferðaætlanini er siglingin langt frá altíð akkurát hesi tímatøl.

– Gevur siglingin ein tørv uppá 70 tímar, má Strandferðslan antin geva monnunum 84 tímar ella 63 tímar. Fáa menninir 84 tímar, kunnu avlopstímar verða nýtttir til viðlíkahald. Men fáa teir 63 tímar, fær manningin yvirtíð frá 63 tímum upp til 70 tímar.

Lønardeildin sigur, at Skipara- og navigatørfelagið hevur kravt, at 84 tímar altíð skulu brúkast.

– Tað er eyðsæð, at hetta er ein stirvin og kostnaðarmikil, og tí er sera óheppið, um hetta verður skipanin umborð á nýggja Suðuroyarskipinum.

Lønardeildin sigur, at fær Skipara- og navigatørfelagið sítt krav ígjøgnum, fer tað ikki at bera til at broyta ferðaætlanina so leingi, sáttmálin er galdandi.

– Tað er ikki bert, tá ið siglingin skal minkast, at trupulleikar verða, men eisini tá ið ætlanin er at økja túratalið.

– Verður siglt meiri enn í dag, má ein vakt umborð afturat, tí reglarnar um hvílda í sjómannalógini forða fyri, at tær manningarnar, sum nú eru, arbeiða meiri.

Lønardeildin sigur, at sum umstøðurnar eru nú, verður tað sera trupult at seta eina manning afturat fyri rímiligan kostnað, tí tá skulu allar tríggjar manningar ganga á vakt 1:1.

Tað, sum fíggjarmálaráðið vil hava, er eina liðiligari skipan.

– Eitt dømi um eina liðiliga skipan er hon, sum er galdandi fyri farmaskip og ferðamannaskip í uttanlandssigling.

– Á hesum skipum er ikki øll manningin á vakt í senn, meðan hon er um borð. Manningin skiftir ímillum at hava frívakt, og tað eru bara vaktirnar ið telja sum arbeiðstíð.

Lønardeildin sigur, at tað eru eisini aðrir møguleikar.

Men tað avgerandi er, at Skipara- og Navigatørfelagið vil flyta seg frá teirri stirvnu skipanini, sum er í dag, sigur lønardeildin.

## Onki verkfall á hesum sinni

Sum sagt fóru semingsmenninir týsdagin undir samráðingar við Fíggjarmálaráðnum og Skipara- og Navigatørfelagnum um nýggjan sáttmála fyri yvirmenninar á Strandferðsluni og fiskirannsóknarskipinum, Magnus Heinasyni.

Tá skuldi samráðast til tað rakk ella stakk. Fekst ongin semja, merkti tað at skipini hjá Strandferðsluni, og Magnus Heinason, vórðu løgd.

Í gjáramorgunin løgdu semingsmenninir eitt semingsuppskot fyri partarnar.

Í síðstu løtu, áðrenn blaðið fór til prentingar, frættu vit, at báðir partar høvdu góðtikið semingsuppskotið.

Sostatt slapp undan, at siglingin hjá Strandferðsluni varð løgd á hesum sinni

Áðrenn blaðið fór til prentingar, vistu vit ikki, hvat stóð í uppskotinum, men tað venda vit aftur til í blaðnum í morgin.

**–Áki–**